## DAGSINS MEINING

# Spenningur í Vágum

Í oddagrein í gjár viðgjørdu vit komandi løgtingsval í Sandoynni, har tað er mest sannlíkt, at tað verður eitt skifti í tingmanningini, nú fyrrverandi tingmaðurin og landsstýrismaðurin hjá Fólkaflokkinum ikki stillar uppaftur. Javnaðarflokkurin setir tí alt inn uppá at fáa mannin og roynir sína sterkastu uppstilling í øllum valdøminum.

Eitt annað av smærri valdømunum, sum er ikki minni áhugavert, er Vágar. Har hava A og B í løtuni tingmenninar. Úrslitið av fólkatingsvalinum bendir á, at B stendur seg sera væl í Vágum og at lítið restar í at fáa 2. mannin. Men eitt er fólkaftingsval, nakað annað er løgtingsval. Tað er lítið sannlíkt, at B fær tveir mans. Tí má roknast við øgiligari kapping millum A og C um hin tingsessin. Ikki tí – man skuldi hildið tað vera náttúrligt, at A fekk mannin, nú tað hevur sitið á hesum sessinum alt skeiðið og hevur verið umboðað bæði á tingi og í landsstýri, og har haft møguleika at samtykkja útbyggingar í oynni. Men tað er greitt, at veljarin hyggur eisini eftir, hvønn politikk landsstýrið hevur rikið á øðrum økjum enn teimum, sum umrøddu umboð fyri A hava umsitið. Her verður ikki minst hugsað um fullveldisrákið í Tinganesi, har tað eydnaðist E at toga A rættiliga langt, áðrenn løgmaður setti bremsuna í. Helst eru tað eisini veljarar hjá A, sum rýma til B og møguliga eisini C sum eitt móttmæli móti fullveldispolitikkinum.

At B fær mannin aftur í Vágum er eingin ivi um. Spurningurin er tí, um tað verður A ella C, sum fær hin mannin. Eftir fólkatingsvalinum at døma stendur ikki alt ov væl til hjá A, men tað er ikki rætt at brúka tað valið sum heilt álítandi barometur. Men tað gevur so eina ábending. C stillar upp við fólkum, sum kunnu taka væl av atkvøðum. Spurningurin er, um tað er nóg mikið til at innheinta ein landsstýrismann og ein tingmann í hvør síni bygd. Hinvegin kann henda, at sambandsveljarar hava innsæð, at teir fáa ikki tveir mans í Vágum, og at teir tí fara at umhugsa, um teir skulu gera av, hvør av hinum flokkunum, A ella C skal hava hin mannin. Tvs. at teir fara at atkvøða taktiskt.

Tá hugsað verður um, at B og C hava verið í andstøðu alt skeiðið, og at flokkarnir hava víst á eitt møguligt samstarv eftir valið, kann henda, at sambandsveljarar heldur fara at lata sína atkvøðu til C. Tað vil so eisini vera ein taktisk skilagóð avgerð, um hetta kann økja um møguleikan hjá B at koma í Tinganes saman við C. Soleiðis ber eisini til at ávirka eitt valúrslit – at leggja sína atkvøðu lokalt, so hon uppá landsbasis og fyri framtíðina betri kann tryggja eins egna flokki lut í landsins stýri.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Tann, sum fær buktina um hálsin…

**– kann sjálvur gera av, hvussu hon skal stramma**

**Elsa Birgitta P. Petersen**



Óli Holm sigur við Sosialin 21. mars, at skúlaleiðslurnar gera sjálvar av, annahvørt flokkarnir hava 24 næmingar ella 25 næmingar.

Hvat við ásetingini í Fólkaskúlalógini § 20? Har stendur: Við skúlaársbyrjan eigur næmingatalið vanliga ikki at fara upp um 24 í hvørjum flokkinum. Er lógin ikki galdandi í hesum serstaka føri longur?

Hvussu sær veruleikin út? Tað er tað, ið tað snýr seg um. Tað er tað, sum foreldrini hava krav uppá at fáa at vita.

Fáa næmingarnir fleiri tímar ella rættari, verða fleiri tímar til undirvísingina?

Hvat við teimum næmingum, sum treingja til stuðul ella hava serligan tørv fyri neyðini?

Óli Holm verður endurgivin í Sosialinum fyri at siga: "Tímar verða ikki latnir til nýggjan flokk, fyrr enn næmingatalið fer upp um 26 næmingar", tað vil siga, at ikki fyrr enn 27 næmingurin kemur í flokkin, skal hann býtast.

Hetta er nakað nýtt, tí í Fólkaskúlalógini og í viðmerkingunum til hana stendur, at flokkurin vanliga eigur at verða býttur, tá 25 næmingurin kemur í flokkin.

Tað er eisini staðfest, at við nýggja tímabýtislyklinum verða eingir tímar til sjúkravikar og heldur eingir tímar verða til undirvísing í frítíðini.

Hví eru eingi tøl løgd fram fyri almenningin, sum vísa á fyrimunir og vansar við tí nýggja tímabýtislyklinum? Hava foreldrini ikki krav uppá at síggja slíkt tøl?

Gamaní, eyka tímar verða latnir, men fær fólkaskúlin størri játtan við nýggja tímabýtislyklinum ella verða brikkarnir bara fluttir runt í skipanini? Ella væntar man í MMS, at eykajáttan sum vanligt verður veitt einaferð í heyst?

Og hvat við teimum skúlunum, sum hava færri enn 70 næmingar? Hvussu verður teirra tímabýti?

Føroya Lærarafelag eigur at seta spurningar, kritiskar spurningar, tí skúlaleiðslurnar hava fingið boð um, at Mentamálastýrið tolir ikki uppafturtøku av tí, sum hendi í Vestmanna skúla síðsta ár.

# Góðu tit øll

**Hans Andrias M. Joensen**

Politikkarar, prestar og føroyingar allir úr Hvannasundi til Fámjins, kring oyggjarnar allar. Mær er sagt, at stórt tal av føroyingum halda lítið um gjeikarar. Men sigi mær, hvat kann tað saka tykkum, at tveir menn eru trúgvir sínum innastu kenslum og siga sum Dávid kongur, sum tað stendur í Sámuelsbókunum, tá hann kvað um sín elskaða Jónatan: "Sáran eg syrgi teg, Jónatan bróðir! Kærur vart tú mær; undursom var mær ást tín, sælari enn kvinnutokki."

Latið menn leggja ást við menn í frið og náðum.

Og til tykkum komandi løgtingslimir: Gott í tykkum, fáið nú gjørt tær neyðugu lógirnar sum geva gjeikarum/samkyndum somu kor í Føroyum sum í hinum Norðurlondum.

Við blíðastu heilsum og Guds vælsignilsi

# Tey gomlu og tey veiku

**Tummas Frank**



Eftir 4 árum við gulltíðum, høgum fiskaprísum og methøgum prísum, hevur ikki nógv verið hugsað um tey gomlu og veiku í samfelagnum. Nógv hevur verið tosað um góðar eftirlønir til tey vælbjargaðu, eftirlønir og annað.

Nú, beint áðrenn tingið fer heim, verður játtað pensiónistum kr. 400,– eyka um mánaðan. Jú gaman í, møguliga nokk til at keypa nakrar oljudropar til eitt nýttársbál. Ein stokkutur varmi. Javnaðarflokkurin vil tey næstu 4 árini útvega 160 nýggj ellis- og røktarheimspláss. Heimarøktin skal útbyggjast til eina døgnrøktarskipan. Komandi 4 árini skulu 160 ellis- og røktarheimspláss verða tøk.

Pensiónin upp á kr. 10.000,– til støk og kr. 16.000,– til hjún um mánaðin. Eitt politiskt høvuðsmál hjá Javnaðarflokkinum er at styrkja fólkapensiónina og lyfta samhaldsføstu eftirlønarskipanina upp til eina munagóða skipan fyri allan arbeiðsmarknaðin.

Fólkapesiónin skal økjast bæði við at hækka upphæddina og við at prístalsregulerað alla pensiónina. Samhaldsfasti eftirlønargrunnurin skal styrkjast bæði við at stovnsfæ grunnsins verður munandi økt, og við at inngjaldið frá arbeiðsgevarunum og løntakarunum verður økt úr 1/2% upp í 2% ein slík øking skal mótvigast við samsvarandi lækking í skattinum.


**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Gleps, ósannindi og rasisma fremja onga søk!

**Heri Simonsen**



Í Sosialinum, leygardagin í farnu viku fór Heðin Mortensen út um øll mørk. Hann legði nýføroyingin Ivan Eginsson undir líkt og ólíkt, og borðreiddi annars við heilum og hálvum lygnum.

At siga, at maðurin: »Hevur onki við Føroyar og føroyskt at gera!« er so langt úti, at sigast kann ikki frá tí. Ivan Eginsson hevur lisið um, og havt áhuga fyri Føroyum síðan 1985. Hann hevur hildið við føroyska landsliðnum, síðan vit fingu FIFA-limaskapin í 1988. Hann hevur lisið og granskað føroyska málið síðan 1995, og hann tosar mál okkara flótandi. Hann vitjaði her í 1995, 96 og 97, og hann hevur verið ein skattaborgari her síðan januar 1998. Maðurin hevur arbeitt og virkað fyri føroysk virki og føroyskar stovnar síðan 1998. Hann hevur eitt søguligt, samfelagsligt, geografiskt og ítróttarligt innlit, sum Heðin Mortensen bara kann droyma um. Kundi verið stuttligt við eini spurnarkapping millum Heðin og Ivan um hesi evni, úrslitið hevði verið givið frammanundan (Sum í øðrum førum!). At Jákup Mørk letur ÍSF-forsetan borðreiða við sovorðnum rasistiskum glepsum og ósannindum er sera, sera harmiligt. Heðin Mortensen kann hava akkurát tað meining (meiningar!) hann vil, men eitt slíkt ófantaligt álop á kanska ein tann størsta og besta Føroyavinin, ið land okkara hevur átt, kann ikki rættvísgerast. Jú víst yrkti Janus »Førum fram!«, men Janus yrkti eisini um eitt annað »slag!«

Annars var kl. 11.00 í Moskva, tá Ivan og Smirnov (IOC-varaforseti) tosaðu saman í telefon, og ikki trúgvi eg, at russar hava býtt um upp á nátt og dag, sum Heðin Mortensen sigur. Og Smirnov hevur olympisku reglugerðirnar frá 14/7 - 2001 at halda seg til, hvørki meir ella minni.

Jú víst eru 100% av øllum føroyingum fyri OL-viðurkenningini. Men sambært Fynd, eru 59% í skrivandi løtu, politiskt ímóti hesi viðurkenning. Men vóru undanstøkking og droyming olympiskar greinar, ja so høvdu Føroyar stórar gullvónir!

# Hallbjørg Hansen, eldrapolitikkur og tjóðveldið

**Dan R. Petersen**
*løgtingsmaður*



Hallbjørg Hansen spyr í eini grein herfyri "Hví hava vit so ikki fyri langari tíð síðani gjørt neyðugu íløgurnar í samfelagnum, soleiðis at tey eldru, sum ikki longur klár seg sjálvi, kunnu hava eina virðiliga tilveru?" Henda spurning kann hon bara seta sínum egnu partamonnum, sum nú í 4 ár hava stýrt landinum, Ongantíð eru so nógvir pengar streymaðir inn í landskassan, og ongantíð er so lítið gjørt á ellis- og røktarheimsøkinum. Hetta er ein klár prioritering. Tjóðveldisflokkurin hevur valt tey gomlu frá. Hallbjørg kann sjálv rokna ut, hvussu mong røktarheimspláss vit kundu fingið fyri tær 366 mill kr, samgongan hevur sagt nei takk til.

Hallbjørg loyvir sær eisini hetta óreiðiliga postulátið: Tjóðveldisflokkurin hevur sum mál fyri eldrapolitikkin, at íløgur í ellis- og røktarheimspláss og eldrasambýli verða raðfest beinanvegin…". Hetta er beinleiðis skeivt, tað prógva tey seinastu 4 árini, og tað prógvar fíggjarlógin fyri hetta árið. Nei, tjóðveldisflokkurin hevur víst eina sanna kynismu móti teim gomlu. Ikki eitt einasta røktarheimspláss í bestu uppgangstíðum.

Einasti eldrapolitikkur, tjóðveldið hevur, er at happa sínar royndu og eldru politikarar út úr flokkinum. Teir gomlu hóvligu skulu út, og teir rabiatu skulu inn. Tað sæst best her í valdøminum, har mandatið ígjøgnum 28 ár skal flytast úr Fuglafirði út á Glyvrar. Her er Hallbjørg ein hent finna, nú hon stendur sjálv onnur á tjóðveldislistanum í bygdini.

Nei, tjóðveldið hevur ongan eldrapolitikk, tað hava teir prógvað hesi árini. Fullveldi og niðurskur av blokkinum er einasta boð, meðan javnaðarflokkurin hevur sett tey eldru ovast á skránna við bygging av 160 ellis- og røktarheimsplássum og pensjónirnar upp í 10.000 kr. fyri støk og 16.000 kr. fyri pør.

Veljarin skal avgera, um vit prioritera fólkið ella nationalismuna fyrst.

# Verandi íbúðarmynstur leggur ungfólk í fíggjarligt haft

**Sunleiv Højgaard**
*Valevni javnaðarfloksins í Eysturoy*



Verandi búðstaðarmøguleikar hjá ungfólki, tað verður seg einstøkum og hjúnum, eru alt annað enn góðir.

Tí er avgerandi neyðugt at fjøltátta íbúðarmøguleikarnar, so sleppast kann undan at allur okkara tilvaksandi ungdómur verður lagdur í fíggjarligar leinkjur hjá peningastovnunum.

Sum er, er Húsalánsgrunnurin ikki tann íbirtari, hann átti at verið og eigur tí at fáa møguleikar at verða tann førandi íbúðarbirtarin á marknaðinum, ið skapar nýggjar møguleikar, bæði fyri ung og eldri.

Tað er av stórum týdningi og neyðugt hjá eini komandi samgongu at fáa ein íbúðarpolitikk, ið skapar møguleikar, sum vit kenna tað í grannalondunum. Á henda hátt fáa vit valmøguleikan.

Møguleikin hjá fólki at leiga seg inn í eina íbúð fyri ein rímuligan prís, uttan at vandi er fyri at verða útkoyrdur, liggur, sum allatíðana og hóttir.

Hvussu vit broyta mynstrið, kunnu verða fleiri meiningar um, men avgerandi er, at skjøtil verður settur á henda stóra trupulleika.

Eitt av grundarlagnum, ið má broytast, er verandi fíggingarmøguleikar.

Í dag er tað stórt sæð bankarnar, sum bæði ráðgeva og fíggja, og minnir hetta ikki einki um "revin, ið ansaði høsninum."

Støðan í dag er, at vanlig verkafólk ikki síggja seg før fyri at fara undir at byggja sær egin sethús, hetta er snøgt sagt alt ov kostnaðarmikið. Møguleikin at leiga ella keypa seg inn í eina íbúð má gerast lættari.

Fjakkaraferðin, fá íbúð til íbúð, er ikki tað eitt vælferðarsamfelag eigur at bjóða barnafamiljum, sum á henda hátt ikki kunna skapa tað fjálga og tryggja heimið, eitt hvørt barn skal hava rætt til.

Hesin trupulleikin skal og má loysast, og er avgjørt eitt av mongum málunum, Javnaðarflokkurin,vil seta skjøtil á í einum komandi valskeiði.

# Vit halda meira enn hini lova!

**Annita á Fríðriksmørk**
*valevni Tjóðveldisfloksins*



Ongantíð eru lønirnar hækkaðar so nógv hjá arbeiðsfólkið, sum seinastu fýra árini, samstundis sum skattalættar eru givnir fyri 200 milliónir krónir.

Ongantíð eru almanna- og heilsuøkið raðfest hægri enn seinastu fýra árini, - játtanin er hækkað við 400 millionum, samstundi sum nýtt sjúkrahús er í gerð, og sjúkrabilar eru skiftir út.

Ongantíð eru pensjónirnar hækkaðar so nógv, sum tey seinastu fýra árini.

Vit hava fingið nýggja dagpeningalóg til tímalønt, har karensdagarnir eru tiknir av.

Endiliga hava vit fingið nýggja arbeiðsumhvørvislóg setta í verk.

Takkað verið sitandi samgongu, hevur privati arbeiðsmarknaðurin fingið ein barsilsgrunn.

Ongantíð eru fíggjarviðurskiftini løgd í so trygga legu, sum tey seinastu fýra árini.

Ongantíð hevur ein samgonga avleverað ein so tryggan pengakassa til eina komandi samgonga, sum hendan samgongan fer at gera 1. mai í ár.

**Alt er relativt**

Tá ið leiðandi fakfelagsfólk siga, at farnu fýra árini hava verið tey strævnastu árini í 25 ár, so má ein spyrja: "í mun til nær, hava hesi ár verið strævin?".

Tjóðveldisflokkurin setti sær fyri fyri fýra árum síðani at fremja m.a. teir batar, sum eru nevndir omanfyri.

Vit komu á mál við rættiliga stórum batum, og tí er umráðandi at førdi politikkur sleppur at halda fram, - og tað ger hann við Tjóðveldisflokkinum.

Vit halda meira enn hini lova!

# Sjálvstýrislógin er semjusøkjandi

**Sigfríður Dam Olsen**
*valevni Javnarfloksins í Vágum*



Alt tykist benda á, at sjálvstýrislóg Javnaðarfloksins hevur eina breiða undirtøku millum Føroya fólk. Og tí er eisini greitt, at hetta uppskot kemur at verða eitt semjusøkjandi átak i Ríkisrættarligu støðuni í einari komandi samgongu.

Seinastu fýra árini hava greitt og týðuliga prógvað, at ein savnandi loysn er sera umráðandi. Harðrendi " alt ella einki" politikkurin hjá Tjóðveldinum og stórum parti av Fólkaflokkinum far ov lítla undirtøku. Tí er greitt at nú má nakað henda, og Javnaðarflokkurin hevur eina gongda leið at vísa á !!

Tann áhaldandi togtoganin um loysing og samband tekur so ómetaliga nógva orku, og av royndum vita vit, at tey, ið togtogast fáa ikki savnað sína orku og hugsan til nakað annað. Og júst í hesi støðu eru vit í dag.

Sostatt er tíðin herfrá og til komandi løgtingsval eitt kærkomið høvið at stíga fram og vísa á ítøkiligar og virðiligar loysnir, ikki bert á tí Ríkisrættarligu støðuni, men eisini á so mongum øðrum álvarsmálum, sum hava ligið á láni seinastu fýra árini.